# Opera: Fýra frumframførslur

**Nútíðar Operahúsið á Holmen í Keypmannahavn hevur í hesi sesongini av sonnum brotið upp úr nýggjum.**

Her hevur ein havt høvi at síggja teir størstu klassisku operurnar, eins og fýra slíkar, sum aldrin áður er leiktar á Kongaliga Teatrinum.

Millum tær kendu operurnar var tann grípandi opera'in Madame Butterfly hjá Puccini um kærleikan millum eina japanska geisha og ein amerikanskan sjóman.

Umframt hesa hevur ein í vetur eisini spælt La Boheme hjá Puccini, Barberin í Sevilla og Tristan og Isolde hjá Wagner.

Men spældar eru eisini fýra operur, sum aldrin áður hava verið á palli á Kongaliga Teatrinum.

Ein teirra er Nabusso hjá Verdi, og sum er ein bíbilsk frásøgn um ein valdsjúkan babylonskan konga, sum í sjúku síni útnevnir seg sjálvan til Gud.

Eisini Lulu eftir Alban Berg um eina grádiga femme fatale, eins og Dancer in the Dark eftir danska komponistin Poul Ruder.

Hóast væl er útliðið er framvegis møguleiki at fara til nakrar operur aftrat. Ein teirra er Kvinden uden skygge, sum verður spæld í døgunum 15. mai til 14. juni; Turandot sum eisini er á skránni í næstum og Kabaret Royal sum verður spæld allan juni mánað og fram til 2. juli.

Tað er helst so sum tikið verður til: Tað er bæði pláss til tær stóru kenslurnar og forvitnið í Opera'ini.



## *Kvinden uden skygge*

*Leikurin er ein ævintýrkend søga um eina keisarinnu, sum ikki kann gerast við barn, tí hon ikki hevur nakran skugga. Hon hevur tríggjar dagar at finna eina kvinnu, sum vil geva henni sín skugga, annars endar alt. Men í seinastu løtu skilir keisarinnan, at hon aldrin kann gerast eydnusom við at snýta soleiðis, og tí offrar hon seg og forloysir ein heilan heim.*
*Leikurin varar oman fyri tríggjar tímar íroknað steðgir.*

